

*Tað var skjótt, at Mason fann sær gentu, Karen Rorholm úr Holstebro. Sofus Poulsen minnist væl tá ið tey giftust. Amtmaðurin Hilbert uttast t.h. var forlovari. Hinir báðir á myndini eru f.v. Husted Andersen, sakførari, og Aksel Jørgensen, stjóri á Balslev*



*Her sæst Mason saman við konu síni Karen*

gista hjá, noyddust vit at fá bæði Royal Marines og Gordon Highlanders orkestrini at marsjera niðan í býin og oman aftur, har vertirnir stóðu og bíðaðu eftir teimum við stórum uppsløgum við antin Royal Marines ella Gordon Highlanders skriva á við stórum stavum. Hesin gistingarháttur var vist eisini tann besti ein kundi hugsa sær, tí so fingu báðir partar notið vinarlag og gleði av at vera saman í nakrar dagar.

## Glaður fyri vitjan í Føroyum

Øll vitjanin var væl eydnað. Serliga minnilig var minningargudstænastan í nýggja kirkjugarði, har bretsku krígsgrøvirnar eru. Tann dagin "masjeraðu" orkestrini og um 100 marinarar av "Brilliant" av kaiuni út í kirkjugarðin, har Bergur Jacobsen, prestur helt gudstænastuna á enskum, og kransar vóru lagdir á gravirnar av øllum teim luttakandi, bæði bretskum og føroyskum. Teirra millum var eisini Sir Frederick.

Hansara 77 ára føðingardagur var 15. mai, og Tórshavnar Býráð fyrireikaði ein døgurða til heiður fyri hann í móttøkuhúsunum hjá býráðnum í Tróndargøtu. Aftan á døgurðan opnaði tey dupulthurðarnar og vakur klassiskur kórsangur tók so væl Sir Frederick sum okkum øll á bóli.

Seinni fekk eg skriv frá honum dagfest 20. mai 1990.

Hann takkaði fyri alt, sum tey høvdu upplivað í Føroyum ta vikuna og fyri blíðskapin, øll høvdu sýnt teimum. Seinni sendi eg honum videobondini, sum Sjónvarp Føroya hevdi tikið av vitjanini, og hann segði, at tey og familjan vóru sera glað fyri tey, og at familjan hevði fingið høvi at sæð bondini.

Hann nevndi eisini, at grannar høvdu nevnt við hann, at tey høvdu sæð brot av føroyavitjan teirra í bretska sjónvarpinum, og í hesi sending luttók hann eisini sjálvur.

Næstu ferð, eg hitti Sir Frederick og Lady Karen, var á donsku sendistovuni í London. Sendiharrin Ole Lønsmann Poulsen hevði boðið teimum til ein døgurða, sum hann hevði fyrireikað í samband við 50 ára starvsdag mín. Løgmaður Anfinn Kallsberg og frú vóru eisini boðin við saman við míni familja og kenningum innan mítt starvsøki.

Sir Frederick og Lady Karen vóru sera glað fyri at kunna luttaka hetta kvøldið. Hann skuldi koyra heim aftur, um 100 km, og hann var ikki nakar unglingi. Seinni havi eg tosað við tey fleiri ferðir. Vanliga hevur hetta verið á føðingardegi hansara, og tað gjørdi eg eisini í fjør. Tá vóru bæði røsk og ondsfrísk, men "getting on in years", sum hann tók til.

Jólakort 2007 vóru send sum vanligt. Tó skuldi hetta fyri hansara viðkomandi verða tað seinasta.

Vil við hesum lýsa frið yvir minninum um mín góða vinmann og Føroyavinin Sir Frederick Mason.



*Mason dugdi eisini at hugna sær. Her er hann við í fótbólti. Tað er hann við plástri á pannuni*

Sosialurin